# Hildigarð er vakrasta genta í Sandoynni



*Hildigarð Petersen á Sandi varð leygarkvøldið kosin at vera vakrasta gentan í Sandoynni.*

**Leygarkvøldið varð hon vald til Miss Sandoy í kapping við tríggjar aðrar**

VAKURLEIKA-KAPPING
*Áki Bertholdsen*

Hildigarð Petersen er vakrasta gentan í Sandoynni.

Tað fekk tann 15 ára gamla gentan heiman av Sandi pappír uppá leygarkvøldið.

Tá varð skipað fyri kapping um at gerast Miss Sandoy.

Fýra gentur høvdu meldað seg til, men tá ið avtornaði dróg Hildigarð Petersen longra stráðið, beint fyri nøsini á Arnu D. Clementsen, sum var nummar tvey. Tað var bara ein atkvøða á muni, so tættari kundi tað ikki verið.

Hinar báðar, sum vóru við í kappingini vóru Hedevig Dalsgaard og Sara Novicka.

Allar fýra genturnar eru Heiman av Sandi og tær fingu allar prógv um, at tær høvdu verið við. Men umframt heiðurin fingu tær allar ein lítlan kekk.



*Hetta eru tær fýra, sum vóru við í kappingini um at gerast Miss Sandoy. Frá vinstru eru tær Hildigarð Petersen, Hedevig Dalsgaard, Arna D.Clementsen og Sara Novicka*

Tiltakið var í virkinum á Sandi, og rættiliga nógv fólk varð samankomið.

Á tiltakinum undirhelt Johan í Kollafirði og hann spældi eisini til dansin aftaná, men tá legði DJ Hustler eisini plátur á.

Tað vóru áskoðararnir, sum dømdi, men eitt serstakt dómaraborð, sum fyrireikararnir settu, hevði eisini eitt orð at siga.

Hetta er onnur vakurleikakappingin í hesum umfarinum. Nakað síðani var Miss Suðuroy vald og leygarkvøldið er tað vakrasta vágagellan, sum skal finnast.

Men hetta er við tí fyrivarni, at samferðslan ikki verður løgd lamin, ella at aðrar forðingar taka seg upp, nú verkfall er.

Ætlanin er at hava kappingar kring alt landið og so at enda við eini finalu, har Miss Føroyar skal veljast. Ætlanin er, at bæði nummar eitt og nummar tvey í hvørjari økiskapping vera við í finaluni.

Tað er ítróttarfelagið »Muaythai Faroes«, sum skipar fyri.

Hetta er eitt felag, sum tvøramaðurin, Bjarni Hammer, hevur stovnað við tí endamáli at íðka tann sermerkta ítróttin, sum eitur kickboxing, í Føroyum.

Og endamálið við hesum vakurleikakappingunum er at styrkja felagið fíggjarliga, so at hetta slagi av ítrótti so við og við kann breiða seg um landið.

# Ær lembt fýra lomb

**Aftur í ár hevur ein ær í Hvalba lemt fýra lomb.Tað er rætttiliga sjáldsamt, sigur djóralæknin**

LEMBING
*Áki Bertholdsen*

**Hvalba:** Nú er lembingin farin at halla og kring alt landið gagna tey, sum fáast við seyð og meta um, hvussu hevur gingist.

Og hjá Óluvu Willumsen í Hvalba, hevur lembingin í ár verið nakað heilt serligt.

Hon eigur nevniliga eina ær, sum lemdi heili fýra lomb í farnu viku, trý gimburlomb og eitt veðurlamb. Trý lomb eru hvít og tað eina er svart.

Tað besta av øllum er, at tað stendur ikki á hjá ærini at føða øll fýra lombini og uttan at hava orðið á teimum ber ikki til at siga annað, enn at tey síggja væl út og eru bæði lívlig og væl fyri.

Tey hava lagt merki til lombini skiftast um at súgva ærina, fyrst tvey og síðani hini bæði.

Ærin er trævetur og í fjør lemdi hon bara eitt lamb, sum var eitt veðurlamb.

Nógv siga, at fóðurið er avgerandi fyri, hvussu nógv lomb, ein ær fær, men Óluva og tey halda ikki, at tað hevur alt at siga.

– Hendan ærin hevur ikki fingið meiri enn allar aðrar, men hon er stór og prúð. Hon hevur gingið í haganum, men allur seyðurin hjá teimum er leskaður við kraftfóðuri hvønn dag, tí tað siga tey at tey altíð gera.

Nú hon hevur lembt fýra lomb, er hon sett í eitt stik at ganga og tey ætla at lata ærina hava øll fýra lombini. Hetta er triðju ferð at vit hava hoyrt um eina ær, sum hevur lembt fýra lomb. Í fjør var tað eisini ein ær í Hvalba, sum, lembdi fýra lomb, hana átti Dan Thomsen. Eitt annað ári var tað ein ær hjá Jòsvein Petersen í Hovi.

Men tað vit vita, eru tær heilt av hvør sínum slagi, so tað er ikki ættarbregði.



*Aftur í ár gongur ein ær í Hvalba við fýra lombum. Tað er Óluva Willumsen, sum eigur ærina, ið lembdi fýra lomb í farnu viku og tað stendur ikki á hjá henni at føða øll fýra lombini*

### Rættiliga sjáldsamt

Lars Mohr Nielsen, djóralækni á Djóralæknastovuni, sigur at tað er rættiliga sjáldsamt, at ær lemba fýra lomb, og at øll lombini liva.

– Aðrastaðni er tað ikki heilt so óvanligt, men okkara seyður er meiri upprunaseyður og hann fær ikki so nógv lomb.

Hann sigur, at í Føroyum lembir hvør ær 1,3 lamb í miðal hvørja ferð, men uttanlands er tað mangan at ærnar fáa væl meiri enn tvey lomb í miðal.

Hann sigur, at fóðuri hevur nógv at siga.

Verður fóðrað væl í brundtíðini, ella beint frammanundan brundtíðini, hevur tað stóran týdning fyri, hvussu nógv lomb ein ær fær.

Á enskum er eitt fyribrigdi, sum nevnist »flushing«.

Tað, er at geva ærnum minni eina tíð, men so at geva heilt nógv beint uppundir brundtíðina.

Annars heldur Lars Mohr Nielsen, at lembingin í ár hevur gingið væl, tí hann hevur ikki frætt um stórvegis trupulleikar.





*Postbilurin stendur á øðrum samdøgri parkeraður á flogvøllinum. Førarin er farin frá honum, og posturin, sum kom við flogfarinum mánadagin, liggur framvegis í bilinum saman við týsdagspostinum*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Postludium

**Tað fekk eftirspæl, at verkfallsvaktirnar ikki sluppu at kanna postbilin á flogvøllinum. Postbilurin, sum varð steðgaður á flogvøllinum mánadagin, verður standandi innan fyri gyrðingina. Verkfalsvaktir eru við øll portrini við flogvøllin**

BLOKADA
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Verkfallsvaktir ansa eftir, at postbilurin ikki sleppur út av flogvøllinum. Grundin er, at verkfallsfólkini halda, at postbilurin flytir farm, sum Postverkið vanliga ikki plagar at flyta.

Tað stendur ein lastbilur hjá Postverki Føroya undir torninum á flogvøllnum. Har hevur hann staðið eitt gott samdøgur, og har kemur hann at verða standandi, siga fólkini, sum arbeiðarafeløgini hava sett at vera verkfallsvaktir við allar inn- og útkoyringar á flogvøllinum.

Verkfallsfólkini hava skipað seg við bilum ymsastaðni kring vøllin, soleiðis at tey síggja alt, sum fer fram við ymsu portrini. Eisini oman fyri sjálvt flogvallarøkið standa tey. Haðani hava tey yvirlit yvir allan vøllin, sum hann er, í einum.

– Vit hava nú sitið her í tríggjar tímar síðan klokkan seks í morgun, greiðir ein av verkfallsvaktunum frá. Tá loystu vit náttarvaktina av. Feløgini hava gjørt av, at vakt skal haldast alt samdøgrið, soleiðis at eingin roynir at fara av stað við bilinum, meðan eingin vakt er.

Vaktarmaðin greiðir frá at tey hava biðið um at sleppa at síggja inn í postbilin, men fingu ikki loyvi. Tí verður bara stongt fyri, so hann ikki slepur av vøllinum.

– Teir kundu bara latið okkum sloppið at sæð, at einki, sum ikki skuldi vera har, var í bilinum. So var alt í lagi, og bilurin kundi farið sín veg, sigur vekrfallsvaktin.

Á parkeringsplásisnum uttan fyri terminalin stendur ein annar postbilur av sama slag, sum tann, ið stendur innan fyri gyrðingina.

Førarin sit inni í terminalinum og fær sær ein kaffimunn. Hann bíðar, til flogarið við postinum kemur fyrrapartin.

– Nei, hann fær ikki postn við sær til Havnar, sigur hann, men hann skal fylla tann postin, sum kemur úr Danmark í dag, inn í bilin, sum sendur inni á økinum, sigur hann.

Tað, sum hann hevur havt vestur við sær, fer á ein vogn og verður koyrt umborð á flogfarið. Tí postinum er einki galið við.

Postbilførarin sigur, at umleið 1.600 kg av posti eru í bilinum, og umleið tað sama man fara at koma í dag, heldur hann. Men tað steðgar so har.

Verkfallsmaðurin uttan fyri heldur, at postmenninir kunnu bara vísa teimum, hvat er í bilinum. Og er ikki annað enn vanligur postur, sum tey siga, í honum, ja, so er einki galið, og bilurin kann ótarnaður fara suður til Havnar.

– Men vit hava eitt ánilsi av, at har er onkur farmur í eisini, sum teir ikki vilja vís aokkum. Tí blokera vit.

Georg Hansen, næstformaður í Føroya Arbeiðarafelag, sigur, at tey hava fingið at vita frá vekfallsvaktunum, at hesi hava illgruna um, at Postverkið hevur tikið onkran farm, sum eitthvørt annað flutningsfelag ikki vildi taka.

– Vit sleppa ikki at kanna tað. Og tá so er, steingja vit heilt, sigur hann.

Hetta er ikki heilt í tráð við tað, ætlanin var, tá verkfallð byraði. Tá var ongangtíð ætlanin at gera nakað við postin. So leingi talan var um vanligan post við pakkum upp til 20 kg.

Men nú tykist støðan vera ein onnur, og so reagera vit eisini hareftir, sigur hann.

At tað stendur ein vognur við postsekkjum, sum skulu við flogfarinum til Danmarkar, innan fyri gyrðingaina, tekur Gerog Hansen róliga.

– Hatta er vanligur postur, sum komin er vestur við bussinum. Og har er eisnki av størri tingum við, sigur hann.

Í aðrar mátar er friðaligt í Vágum, sigur Georg Hansen. Fiskavirkini eru stongd, og fólk hava skikkað sær væl, so einki er at fara eftir.

Alibrúkini hava fingið undantaksloyvi at taka deyðan fisk upp, og tað gera tey so. Men her vesturi er ikki ILA í ringunum, so nøgdirnar, her skulu takast, eru smáar.

– Vit hava vaktir kring í oynni, sum alla tíðina hava eyguni við arbeiðsplássum, har fólk eru í verkfalli. Og har hava eingir rupulleikar verið, sigur Gerog Hansen, næstformaður í Føroya Arbeiðarafelag.



*Hóast eingin postur sleppur út av flogvøllinum, er einki til hindurs fyri, at vanligur postur fer hinvegin*

*Mynd: Edvard Joensen*

## Færri fólk á flogvøllinum

**Tey, sum starvast a flogvøllinum, siga, at tey leggja merki til, at færri fólk eru at síggja har vesturi um dagarnar. Tey skylda upp á manglandi bensin**

FERÐSLA
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Tað koma færri fólk á flogvøllin at taka í móti og siga farvæl, enn vanligt hevur verið, síðan Vágatunnilin lat upp.

Tey, sum arbeiða á flogvøllinum, eit nú í cafeteria, siga seg siggja týðuliga minking í fólkatalinum, nú síðan verkfallið av álvara er farið at merkjast.

Síðan Vágatunnili lat upp, er talið á teimum, sum koma við og eftir flogferðafólkið, vaksið munandi samanborið við tað, tað var, tá siglast skuldi um Vestmannasund.

Men nú hevur verkfallið avmarkað hesa ferðsluna munandi, siga tey á flogvøllinum. Tað er skilligt, at fólk halda seg aftur, tí einki brennievni er til bilarnar.

Eisini meta tey, at fleiri eru farin at brúka bussarnar aftur. Og onkur, sum arbeiðir á flogvøllinu, er farin at súkkla til arbeiðis, eins og summi, tó serliga sørvingarnir, ganga aftur og fram.

Men tey merkja einki til verkfallið annars í cafeteria, siga tey. Vøru hava tey nokk av, tí ríkiligt varð keypt inn, áðrenn verkfallið byrjaði. Tað einasta, sum manglar, er frukt og grønmeti, sum plagdi at fáast við diskin.


